# Zacharias Heinesen og Kierkegaard í Leikalund

**Fríggjadagin letur upp listaframsýning við Zacharias Heinesen í Leikalund. Eisini fer Ólavur Rasmussen prestur at greiða frá og signera bók sína** *Antin Ella* **um Søren Kierkegaard, sum kom út herfyri**

List/Bøkur

*Í eini samrøðu hevur Zacharias Heinesen skírt seg sjálvan "kubistiskan naturalist". Skoyta vit uppí, at málihátturin er koloristiskt geometriserandi, at hann arbeiðir seg burtur frá perspektivinum, so hava vit kanska eina hóming av listamanninum og hansara avriki. Hann improviserar yvir litirnar og tað darrandi lívið í flatanum. Pør av mótsetningum verða sett upp: stórt/smátt, ljóst/myrkt, róligt/óróligt. Hesir lutir verða síðani viðgjørdir, so teir gera eina heild, sum altíð hevur størri týdning enn tann einstaki parturin av málninginum.*

*Ígjøgnum føroyska myndlist ferðast eitt myrkt rák, men Zacharias Heinesen hevur ongantíð rættiliga verið partur av tí – hansara tóni er einamest lyriskur og lættur. Spurdur, hvussu hetta ber til, vísir hann til teir tunglyntu myrku vetrarnar og staðfestir: - Eg haldi meg til tað ljósa.*

(úr bók eftir Jógvan Isaksen um Zacharias Heinesen)

### Heinesen og Kierkegaard

Zacharias Heinesen er føddur í 1936, og er ein av okkara stóru listamonnum, ið hevur fingið viðurkenning víða um, fyri sína list.

Hann hevur havt listaframsýningar víða um, og hevur m.a. prýtt Eysturskúlan og Lágargarð í Havn. Eisini hevur hann gjørt altartavuna, í donsku kirkjuni í Suðurslesvík. Á fleiri listasøvnum er hann umboðaður, og í 1986 fekk Henry Heerup Heiðursgávuna.

Á framsýningini, ið letur upp fríggjadagin 2. desember, fer Zacharias Heinesen at sýna fram nýggjar oljumálningar.

Ólavur Rasmussen, prestur, kemur eisini at vitja Leikalund fríggjadagin. Hann fer at greiða frá og signera bókina, *Antin ella*, ið er um Kierkegaard, og sum júst er útkomin.

Til ferniseringina, kemur Helga Gerðalíð, tónleikari, at spæla nøkur løg.

Ferniseringin byrjar fríggjadagin kl 16.00, og listaframsýning verður hangandi allan desembur mánaða

**ave**






*Fríggjadagin verður høvi at síggja nýggjar málningar hjá Zacharias Heinesen umframt at fáa bókina* Antin ella *hjá Ólavi Rasmussen signeraða í Leikalund í Klaksvík*

# Jens Lisberg í Miðlahúsinum

**Jens Lisberg fer leygardagin at skriva seg á tann longu langa listan av framúrskarandi tónleikarum og sangarum, sum hava spælt í Miðlahúsinum í Vágsbotni, síðan húsini lótu upp í summar**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrrverandi Sputnikkarin og frálíki undirhaldarin Jens Lisberg spælir leygardagin kl. 16.00 í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Saman við Berguri Godtfred og Kristian Blak fer Jens Lisberg at spæla løg av nýggju dupultu savnsfløguni hjá sær.

Savnsfløgan er fyrsta fløguútgávan hjá hesum vælumtókta sangara og lagskrivara. Talan er um dupultfløgu við ikki færri enn 40 løgum. Hon er júst komin í handlarnar.

Á fløgunum eru løg av bondum, sum Jens hevur gjørt seinastu 24 árini. Jens hevur verið sera virkin bæði sum einstaklingur og sum limur í bólkinum Sputnik. Sputnik gav t.d sjey bond út. Tey flestu vóru stak væl umtókt, men einki av hesum er komið á fløgu. Tí kemur savnsfløgan ikki eina løtu ov tíðliga.

Millum útgávurnar hjá Sputnik var eitt jólaband, ið kom út í 1991. Tí vera ivaleyst jólatónar at hoyra millum løgini í miðlahúsinum leygardagin.

Miðlahúsið hevur seinasta hálva árið vunnið sær pláss, sum eitt livandi hús í Tórsgøtu við tí væl umtókta Trapputinginum, fundum av alskyns slag og konsertum við føroyskum og útlendskum einstaklingum og bólkum. Leygardagin skrivar ein tann størsti undirhaldarin, ið Suðuroyggin hevur fostrað seg á listan yvir tey, ið hava verið við til at gera Miðlahúsið til ein mentanarmiðdepil mitt í Havnini.



# Tunnil millum Vestmanna og Leynar

**Vestmenningar vilja hava tunnil ímillum Vestmanna og Leynar og teir strongja nú á landsstýrið fyri at fáa arbeiðið sett í verk**

VESTMANNATUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vestmenningar eru nú farnir til arbeiðis fyri at fáa tunnil ímillum Vestmanna og Leynar.

Bæði Vestmanna Bygdaráð og Heidi Petersen, løgtingslimur úr Vestmanna, eru nú farin at strongja á Løgtingið og landsstýrið fyri at tunnil gjørdan ímillum Vestmanna og Leynar.

Vestmanna Bygdaráð vísir á, at tað eru nú næstan tvey ár síðani, at kommunan fyrstu ferð heitti á landsins myndugleikar um at gera tunnil ímillum Vestmanna og Leynar.

Tá fekk bygdaráðið til svar, at Landsverk og Vinnumálaráðið arbeiddu við at gera eina yviskipaða ætlan fyri undirstøðukervið í Føroyum og at áheitanin um tunnil ímillum Vestmanna og leynar, skuldi viðgerðast í tí sambandinum.

Vestmanna Bygdaráð sigur, at nú eru tvey ár farin, men enn hevur onki verið at frætt um eina yvirskipaða ætlan og ei heldur hevur nakað verið at hoyrt um ein Vestmannatunnil.




*Eftir fyribils ætlanini skal tunnilin ímillum Vestmanna og Leynar fara inn í fjallið beint omanfyri Válin í Vestmanna og koma útaftur Frammi í Líð í Leynum, har undirsjóvartunnilin eisini kemur upp. Koyrivegurin er 12 kilometrar langur, men ein tunni verður seks kilometrar langur*

Samstundis hevur nógv verið at hoyrt um aðrar tunnilsætlanir.

Nú heitir Vestmanna Kommuna sostatt einaferð enn á Landsverk um at fara undir at fyrireika ein Vestmannatunnil.

### Fer í Løgtingið við málinum

Heidi Petersen, sum er tinglimur úr Vestmanna hevur somuleiðis tikið tráðin upp og hon fer nú at reisa málið um tunnil ímillum Vestmanna og Leynar í Løgtinginum.

Tí hevur hon nú spurt Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum, hvussu gongur við hesi yvirksipaðu ætlanini fyri undirstøðukervið.

Í hesum sambandi vil hon eisini hava at vita, hvussu frammaliga ella aftarliga, Vestmannatunnilin er raðfestur í hesi yvirskipaðu ætlan.

Sostatt vil hon hava at vita, hvar í røðini yvir ætlaðar tunlar, at Vestmannatunnilin er.

Hon vil eisini hava at vita um nakrar fyrireikingar eru gjørdar við tí í hyggju at gera tunnil ímillum Vestmanna og Leynar.

Somuleiðis spyr hon landsstýrismannin, hvar hann ætlar at gera fyri at skunda undir eina slíka ætlan.

### Seks kilometrar

Bæði Heidi Petersen og Vestmanna Bygdaráð vísa á, at tað er sera nógv ferðsla á vegnum ímillum Vestmanna og Leynar.

Samstundis er talan um eitt vegastrekki, sum er sera torført at koyra eftir í kava og vindi um veturin.

Teljingar hjá Landsverki vísa, at í 2004 koyrdi 1016 bilar um dagin til og úr Vestmanna. Hetta sama árið koyrdu 1015 bilar til og úr Vágum um dagin.

– Vegastrekkið ímillum Vestmanna og Leynar er 12 kilometrar langt, men ein tunnil verður einar seks kilometrar langur, sigur Heidi Petersen.

Eftir ætlan, skal tunnilin fara í fjallið beint omanfyri Válin í Vestmanna og hann skal koma útaftur Frammi í Líð í Leynum, har undirsjóvartunnilin til Vágar kemur upp.

Heidi Petersen vísir á, at ein tunnil í millum Vestmanna og Leynar fer at hava við sær, at bæði arbeiðsfólk og vinnulív fáa munandi betri umstøður.

Í hesum sambandi vísir hon á, at um árið verða eini 6000 tons av fiski koyrd úr Vestmanna til Havnar til avskipingar og harafturat verða eini 3000-4000 tons av feskum fiski flutt til og úr Vestmanna um árið til virkingar.

– Eisini fer ein Vestmannatunnil at hava við sær munandi sparingar í asfaltering, kavarudding og aðrari røkt, leggur Heidi Petersen afturat.